# FAROE
LAW

## Virkisbygningur til sølu

Um hóskandi boð fæst, verður vegna trotabúgvið P/F Snodd við hesum lýstur til sølu virkisbygningur á kajøkinum á Toftum, matr. nr. 435h, Toftir.

Talan er um ein bygning á leigaðum grundøki til víddar 2600 m² við ástandandi virkisbygningi, við eini grundvídd á 1012 m², umframt skrivstovuøki á 210 m², við tilhoyrandi skrivstovuinnbúgvi. Í bygninginum er eisini ein skiljilinja til heilan fisk av slagnum Marel, umleið 300 fiskakør, 4 trukkar, umframt onnur útgerð.

Bygningurin liggur væl fyri á kajøkinum í vælskipaðum havnaøki og hevur verið brúktur til fiskivinnuendamál og útleigan.

Áhugað kunnu venda sær til Óla Hansen, advokatfulltrúa á telefon 669904 ella á teldupostadressu oha@faroe-law.fo

**Advokatpartafelagið Faroe Law**
Yviri við Strond 15 · Postboks 158 · FO-110 Tórshavn
Tlf. 66 99 00 · fax 66 99 01



# Sethús í Hvannasundi til sølu

Við hesum verður sethúsaognin Sundsvegur 18 (matr.nr. 15), Hvannasund, lýst til sølu.

Sethúsini eru uml. 60 m2 til støddar í trimum hæddum. Grundøkið er uml. 360 m2 til støddar.

Myndir eru á heimasíðu okkara www.lawfirm.fo

Áhugað kunnu venda sær til
Irdi E. Toftegaard, it@lawfirm.fo
ella Jógvan E. Ellefsen.

Sosialurin 341800

**ADVOKATFELAGIÐ VIÐ STROND 4**
YVIRI VIÐ STROND 4 · TEL 203040 · FAX 203041 · P.O. BOX 359
FO-110 TÓRSHAVN · FAROE ISLANDS
EMAIL: LAWFIRM@LAWFIRM.FO · HEIMASÍÐA: WWW.LAWFIRM.FO

JÓGVAN PÁLL LASSEN · PETUR EVEN DJURHUUS
JÓGVAN E. ELLEFSEN · ANNA DAM · INGI HØJGAARD
GUNN ELLEFSEN · MIMI STEINTÓRSDÓTTIR

Starvslýsing

**Børn & Ung:** Stuðulsfólkaskipanin fyri børn

## Starvsfólk til Stuðulsfólkaskipanina fyri børn

**Stuðulsfólkaskipanin fyri børn søkir eftir sjúkrarøktarfrøðingi.**

**Í Streymoy**
Uppgávan er í løtuni at starvast í toymi, sum heldur til í Skúlanum á Trøðni. Toymið er dagtilboð til børn og ung við fjølbreki. Arbeiðstíðin er 32 tímar um vikuna at byrja 1. februar ella eftir avtalu.

Stuðulsfólkaskipanin fyri børn søkir eftir starvsfólki við námsfrøðiligari / heilsufrøðiligari útbúgving.

**Í Streymoy**
Uppgávan er í løtuni at starvast í toymi, sum heldur til í Skúlanum á Trøðni. Toymið er dagtilboð til børn og ung við fjølbreki. Arbeiðstíðin er 22 tímar um vikuna at byrja 1. februar ella eftir avtalu.

Um fólk við námsfrøðiligari/heilsufrøðiligari útbúgving ikki søkja starvið kann hjálparfólk verða sett.

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Nærverkið, Børn og ung, Stuðulsfólkaskipanina fyri børn tel. 360000.

**Umsókn**
Skrivlig umsókn við prógvum og viðmælum skal sendast til:
Nærverkið - Børn og Ung
Stuðulsfólkaskipanin fyri børn,
Argjavegur 26
Postboks 3037
110 Tórshavn

**Umsóknarfreist: 24. januar 2011**

Lesið alla lýsingina á heimasíðu okkara:
www.naerver.fo / leys størv

Nærverkið veitir tænastur til borgarar við serligum tørvi, sum búgva heima, á bústovnum ella á sambýlum. Vit skapa møguleikar fyri lívsgóðsku við støði í tørvi og førleika hjá tí einstaka. Okkara eyðkenni er, at starvsfólkið leggur dent á professionalismu, dygd og nærleika. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almannamálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Børn & Ung. Umleið 1600 fólk starvast í Nærverkinum.

**NÆRVERKIÐ**
www.naerverk.fo
Meginskrivstovan · Argjavegur 26 · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn
Tel 360000 · Faks 360001 · naerverk@naerverk.fo · www.naerverk.fo

**Fuglafjarðar Kommuna**

# KUNNGERÐ UM BÝRÁÐSFUNDIR 2011

Tað verður hervið gjørt kunnugt, at almennu býráðsfundirnir fyri ár **2011** verða hildnir hesar **hósdagar kl. 16.30** í býráðssalinum.

27. januar
24 februar
31. mars
28. apríl
26. mai
23. juni
25. august
29. september
27. oktober
24. november
15. desember

*Fuglafjørður, tann 17. desember 2010*

**Fuglafjarðar býráð**

Sosialurin 341800

***Sjálvstøðugur hárfríðkari***

***Gongur tú og droymir um at blíva sjálvstøðug/ur hárfríðkanar kvinna/maður, so er møguleiki, at ogna tær ein part av hárfríðkanar salong í Havn, sum er til sølu.***

***Salongin liggur væl fyri og inntøku møguleikarnir eru góðir***

*bill mrk. 140111*

**Sosialurin**
www.sosialurin.fo

www.ebenezer.fo

**SUNNUDAGSSKÚLIN**
í Ebenezer er hvønn sunnudag kl. 12.00
**Øll eru hjartaliga vælkomin!**

